# Grønir fingrar á frítíðarskúlanum

*Kom og hygg ! Gularøturnar hjá okkum spíra longu !!*, róptu Sólja og Emma alspentar og vildu alt fyri eitt vísa mær hesa framgongd í teirra heilt egnu rundleiddu grønsaksveltu uppi á bakkanum við frítíðarskúlanum. Eg fór so yvir at hyggja eftir teirra fittu veltu, har Sólja peikaði mær á onkran evarska lítlan spíra, sum líktist meiri einum grasstrái enn eini gularrót. Men bløðini hjá radisunum sóust longu, so gularrøturnar skuldu nokk koma seg seinni á sumrinum.

Tað eru helst fá ella eingin av teimum 93 frítíðarskúlabørnunum, sum ikki hava hjálpt til við at gera eplaveltur, køkkenhavar og teirra steingarðar og plantuskeltir seinastu vikurnar. Í frítíðarskúlanum á Argjahamri koyra verkætlanir sum perlur í bandi, ein leiðir til aðra, og tvinnar saman nógvar ymsar lærugreinar og evnir hjá børnunum. Tá er tað ótrúliga stuttligt sum starvsfólk at uppliva at blíva rivin við av eldhuganum og hugflognum hjá teimum umringandi børnunum; hetta, at liva í núinum og at royna allar møguleikar, sum børn eru meistarar í.

Men hvussu var tað nú, at vit í frítíðarskúlanum knappliga forvandlaðust til sjálvforsýnandi gartnarar ? Jú, tað var Gutti í spísikamarinum, sum lærdi ein fimta flokk at velta eplir í skúlagarðinum, og tá ið hann gav okkum eina rúgvu av seteplum, sum lupu av, fingu vit í FÁA brell eftir at geva hesum fimta flokkinum kapping. Nikkil gav Fríða og mær grønt ljós og vit settu hol á eitt stykki av jørð, sum í næstu løtu var fylt við røskum dreingjum og gentum, sum skiftust um at saksa og grava holir. Nikkil stóð fyri flagveltuni, meðan eg gjørdi eina meira tíðarkrevjandi hyppiveltu við síðuna av. Hetta var bara byrjanin til aðrar veltur, køkkinhavan, taðing við tara og sandi frá Sandágerði, hestatøð frá hestunum hjá Eyðnu, plantuskeltir við tekningum hjá børnunum og áhugaverdari vitan um tað undurfullu lívfrøðina í náttúruni, sum ein telda ikki megnar at endurgeva. *Nú grava tit heilt niður til Kina*, segði Ann við teir ivrigu dreingirnar, sum júst høvdu lært, hvat eitt „krákunev“ er fyri nakað. Ímeðan komu nakrar gentur rennandi oman úr haganum við yvir hálvtrýss maðkum í einum bikari, um Sanna hevði talt rætt – „til at gera moldina góða“. Køkkenhavin hjá okkum kom seinni. Her sáddu vit mangt og hvat, mairøtur, kárabi, leyk, gularøtur, persillu, sitrónmelissu, purrleyk, you name it, og umgyrdu vit hesar nyttuplantur við lupinum – og so at laða garð, „líka sum mann byggir lego“. Sanna og Villiam vóru ófør at laða garð og gjørdu enntá ein varða burtur úr restum. Amboðini úr smíðrúminum, sum mestsum høvdu staðið óbrúkt, vóru nú fleiri ferðir úti at venda.

Í gjár var eg uppi á bakkanum í mjørkanum og tók myndir av verkinum, sum nú spírar og fær meg at hugsa um tann lekra grøna millummálan, sum bíðar okkum í heyst við fritýrustoktum eplum og rákosti. Mmmm... Ímeðan vit bíða, mugu vit

„hyppa“, so at eplini ikki bara veksa upp í slokk !

*Napoleon Smith*




*Illustration 1: 470 seteplir til 100 fólk - so kunnu tit gera roknistykkið sjálvi.*



*Illustration 2: Eplaslokkar ímillum tara, kunsttøð og hestalort.*



*Illustration 3: Stuttligt at síggja úrslit !*


*Illustration 4: Okkara fitti køkkenhavi við frískum plantuskeltum.*



*Illustration 5: Flotta veltan, sum Emma og Sólja sjálvar hava gjørt.*



*Illustration 6: Spíri : "Hvør segði, at eg ikki kundi vaksa her uppi á hamaranum?"*



*Illustration 7: Mest originala veltan, henda veltan hjá Jákup og teimum.*